


***Nr. 19*** ***21. september 2014*** ***74. árg.***

# Útvaldur til ævinleikan

*Við tað at Gud frammanundan í kærleika ætlaði okkum til at hava barnakor hjá sær sjálvum fyri Jesu Krists skuld.*

*Ef. 1,5.*

Tá ið eg líti meg um í heiminum, er har mangt, sum ræðir meg. Og tá ið eg líti inn í mítt egna hjarta, er har mangt, ið ger meg sorgarbundnan. Alt ov ofta sær út til, at djevulin sleppur at stýra bæði úti í stóru verð og inni í hjarta mínum. Tí má eg sum kristin leita mær tryggleika og gleði onkra aðrastaðni. Og tí eri eg so avbera fegin um orðini her omanfyri. Her fái eg at vita, at eg eri útvaldur av Gudi! Mín tryggleiki og gleði liggja ikki í nøkrum í mínum egna hjarta, men í Guds ævigu útveljing og avgerð. Hann hevur frammanundan gjørt av at geva mær barnakor hjá sær. Eg eri útvaldur til ævinleikan!

Torført er at taka støðu til orðini "ætlaði frammanundan" – eins og livdu vit undir einari óbroytiligari lagnu. Men at Gud frammanundan hevur ætlað, merkir ikki, at tað er avgjørt frammanundan, hvør ið glatast og hvør ið verður frelstur. Tvørturímóti! Guds vilji er, at øll menniskju skulu verða frelst. At tað er avgjørt frammanundan merkir: Guds er æran, at vit verða frelst, og tað er okkara egna skyld, um vit ikki verða frelst. Tí Gud hevur gjørt alt klárt til frelsu okkara við at senda okkum Jesus. Tað er undurfagurt at síggja lív sítt sum kristin í hesum ljósi. Tí nýti eg ikki orðini um útveljingina til filosofiskar spekulasjónir, men lati meg ugga av teimum. Tá ið ivin fær trúgv mína at ridla – um umvendingin nú mundi vera ektað – tá er gott at vita, at alt hetta hvílir í Guds avgerð og ikki mínari. Tí langt áðrenn eg dugdi at hugsa ein tanka um Gud, hevur hann hugsað tankar um meg – frelsutankar! Tí kann eg hvíla trygt!

*Ein stund hjá tær , o, Jesus,*
*tá syndin pínir meg,*
*og vantrúgv mær vil forða*
*at hyggja bert á teg, -*
*ein stund hjá tær, o, Jesus,*
*og byrðin svinnur burt,*
*og syndin missir megi,*
*og eygað verður turt.*

*Gev mær tí ofta, Harri,*
*á lívsins tronga veg*
*hjá tær ein stillan tíma*
*at tala bert við teg.*
*At vera hjá tær, Jesus,*
*er hjartans djúpa trá,*
*á foldum og í himli*
*tín halgidóm at sjá!*

# Harrin troystar, hjálpir og lyftir upp

Á einum sunnukvøldsmøti í Meinigheitshúsinum herfyri var evnið missión. Eftir sjálva taluna sóu vit eina stutta myndarøð av Lauru Clarke, dóttir trúboðarahjúnini Maureen og Christopher Clarke. Hon doyði fyri stuttum bara 7 ára gomul, eftir at hava verið illa sjúk av krabba í næstan tvey ár.

Henda myndarøð greip meg um hjartað, og eg fór sorgarbundin og hugtung av møtinum og suffaði upp til Guds: ”Hví Harri? Tað virkar so meiningsleyst!”

Og eitt svar fekk eg løtu seinni. Tá ið eg kom heim, ringdi ein kona til mín. Hon er 90 ára gomul og púra klár við góðum minni. Sjálvt um hon ikki orkar sjálv at koma á møti, er hon ógvuliga áhugað at hoyra, hvussu tað gongst, og hvat ið prædikað hevur verið um.

Tá ið eg hevði sagt henni frá tí, svaraði hon mær aftur: ”Nú skal eg siga tær eitt. Í einum av bókunum hjá Peturi Jacob Sigvardsen stendur ein frásøgn um, hvat ið presturin Jóhan Nielsen úr Sandvík upplivdi. Sum ungur fekk hann tuberklar og lá á Sanatoriunum. Har lá eisini ein 5 ára gamal drongur, sum var ógvuliga ússaligur og treivst illa. Jóhan fekk so smádreingin inn á sína stovu, og har komu teir at liggja lið um lið í hvør sínari song. Jóhan var ógvuliga góður við henda drong. Hann fortaldi honum søgur og sang barnasangir og sálmar fyri honum, og vend kom í, nú fór hann at trívast.

So eitt kvøldið hevði hann sum vant sungið fyri honum, lisið Faðirvár og signað hann. Drongurin sovnar, men um náttina kom hann upp og vakti Jóhan og segði: ”Jóhan, nú fari eg at doyggja.”

”Tvætl í teg,” svarar Jóhan aftur, ”tú batnar í hvørjum, og nú verður tú frískur.”

”Nei,” svarar drongurin, ”Jesuspápi var her, og hann segði við meg, at í nátt fari eg at doyggja. Eg skal koma upp til Himmals, tí har hevur hann brúk fyri einum lítlum eingli. Hann segði eisini

við meg, at eg skuldi ikki vera bangin, tí hann skuldi senda tveir einglar at koma eftir mær í nátt."

Jóhan helt, at drongurin mundi hava droymt. Hann fór tí upp aftur at balla hann og sita hjá honum, til hann var sovnaður. Og so legði Jóhan seg aftur at sova. Men morgunin eftir var drongurin deyður.

Hatta var so frásøgnin hjá Peturi Jacob Sigvardsen. Men eg skal siga tær, hví Jesus tekur hesi børnini heim. Hann hevur brúk fyri teimum, sum smádrongurin segði, at biðja. Tað stendur í Opinberingini 7. kap. vers 15 um tey, sum eru deyð í trúnni: "Tess vegna eru teir frammi fyri hásæti Guds og tæna honum dag og nátt í templi hansara."

Har standa tey og biðja onnur menniskju til frelsu, tí tey eru so sterk í bønini," endaði tann gamla konan, og eg, sum kom so hugtung aftur av møti, kendi meg upplyfta og uggaða av hesum orðum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tey bestu klæðini

*"Farið eftir teimum bestu klæðunum og latið hann í tey." Luk. 15,22.*

Hvat er tað, sum Jesus vil siga okkum við hesum orðunum, sum faðir hin burturfarna sonin sigur: tey bestu klæðini?

Tað skuldu vera tey bestu klæðini, tí tað var hin óverdigasta, sum tey skuldu fjala og pynta. Tá ið hin djúpast falni kemur heim, er gleðin størst. Hesi viðurskifti lesa vit um allastaðni í Guds orði. Um tú so ert hin størsti av øllum syndarum, so vil Gud sýna tær langmóð sum tí størsta. Harrin sigur: "Tá ið eg fyrigevi tær, skammast tú vegna tína skemd og letur ikki longur munnin upp".

Sum hin burturfarni sonurin man hava skammast! Hvussu stór eydna man ikki hava fylt hjarta hansara, tá ið faðirin so hjartaliga tók ímóti honum. Hann visti fullvæl, hvussu djúpt hann var fallin. Men til hin óverdigista av øllum hevur faðirin goymt tey bestu klæðini.

Men Guds hjarta hevur størst hugna í at gera syndarar ovurbilsnar, tá ið hann fyrigevur teimum, og teir als ikki hava væntað tað. Onki er honum kærari enn at síggja tað smædni og ta gleði, sum lýsir av einum syndara, tá ið hann sum hin óverdigasti fær hina størstu náðina og verður latin í tey bestu klæðini.

*t.* týddi.

# Eitt lív burturi frá Gudi

(Luk. 16, 19-31)

”Nú havi eg livað alt lív mítt uttan Gud, og eg skal vísa tær, at eg eisini kann doyggja uttan Gud.” Og nakrar dagar seinni læt eg eygu hansara aftur á einum fremmandum sjúkrahúsi langt heimanífrá.

Soleiðis greiðir ein sjómanstrúboðari frá og leggur afturat: ”Og hóast tað nú eru mong ár síðani, so stendur hendingin enn so ljóslivandi fyri mær.”

Ríki maðurin í frásøgnini um ríka mann og Lázarus hevði latið hjarta sítt aftur fyri Gudi. Hann livdi lív sítt burturi frá Gudi og mátti nú eisini doyggja uttan Gud. Hjarta hansara var stongt fyri øllum tí, sum hevði við Guds ríki at gera. Ongan áhuga hevði hann havt fyri lógini og profetunum, og hetta stongda hjartað stóð nú framman fyri einum stongdum Paradísi.

Gud gávi, at ongin okkara fer at liva við einum hjarta, sum er stongt fyri Gudi, og sum tí at enda fer at standa framman fyri einum stongdum Paradísportri. Opna hjarta títt fyri honum og lurta eftir orðinum, sum talar um synd tína, men eisini um Jesu endaleysa, fyrigevandi kærleika.

Tað er ikki bara eitt tiltak, tá ið talað verður um ”hesumegin eg hinumegin.” Lív okkara hesumegin og lív okkara hinumegin eru líka fast knýtt at hvørjum øðrum sum sáðtíð og heystartíð.

*Eg vil fylgjast við tær, ver mær altíð við lið,*
*hoyr eg bønliga heiti á teg:*
*Lat við lívslok mítt meg kunna hvíla í frið’,*
*til tú nevnir í dýrd tíni meg!*
*Tá æviga við tær eg livi!*

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 21. sept. | Tekstur: | 1.Mós. 12, 1-5 og 18, 1-15; | bíbliuorð: | Sálm. 143,8b |
| 28. sept. | Tekstur: | 1.Mós. 21,1-5 og 22,1-19; | bíbliuorð: | Ják. 2,23 |
| 5. okt. | Tekstur: | 1. Mós. 24,1-67; | bíbliuorð: | Matt. 7,7 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




**Nr. 20** **5. oktober 2014** **74. árg.**

# Hvønn lítur tú á?

*Tveir menn fóru niðan í halgidómin at halda bøn, annar var fariseari og annar tollari. Farisearin stóð og bað soleiðis fyri seg sjálvan: "Eg takki tær Gud, at eg ikki eri sum aðrir menn: ránsmenn, órættvísir, horkallar ella líka sum hasin tollarin. Eg fasti tvær reisur um vikuna, eg lati tíggjundin av øllum, sum mær ognast." Men tollarin stóð langt burtur og vildi enn ikki hevja upp eygu síni móti himli, men sló seg fyri bringuna og segði: "Gud náði meg syndara!"*

*Luk. 18,10-13.*

Í hesum líknilsinum um farisearan og tollaran heldur Jesus eini sjóneyku uppi yvir tveimum syndum, sum vit dagliga ikki halda vera serliga stórar: sjálvrættvísi og hugmóð.

Farisearin hevði eftir vanligari hugsan – og eftir síni egnu – ikki serliga nógv á síni samvitsku, onga synd at játta, og onki fall at skammast av. Kanska var tað tí, at samrøða hansara við Gud gjørdist ein einarøða, og at høvuðspersónurin í henni var hann sjálvur og ikki Gud. Í "bøn" síni nevnir hann Gud bara einaferð, men seg sjálvan heilar fýra ferðir. Hansara viðurskiftir við Gud tykjast vera ógvuliga fjar, júst sum viðurskifti hansara við tollaran har úti við tempuldyrnar!

Farisearin leit ikki á Gud, men á seg sjálvan. Hann helt seg vera rættvísan. Men tann, sum vanvirðir eitt menniskja, hvussu djúpt tað so er fallið, er ikki rættvísur, men hugmóðigur og dugir ikki at meta um sína egnu støðu.

Hugmóð er okkara veruliga synd, og hetta botnar í eini falskari meting av okkum sjálvum og næsta okkara og einum øgiligum ókunnleika um Gud, sum stendur teimum hugmóðigu ímóti, men vísir teimum eyðmjúku náði.

Tollarin leit ikki á seg sjálvan, men á Gud. Hann rópti seg sjálvan ein syndara – og var tað. Hann bað himmalsins Gud um náði – og fekk hana.

*Eg legði alt á Jesus, ogn og mál,*
*allar mínar syndir, lív og sál,*
*trúareyga sá hans deyðakor.*
*”Fyri teg eg doyði,” er hans orð;*
*mær frá hjarta byrðan burtur svann,*
*frið eg fann.*

*Eg leggi alt á Jesus; nátt og dag*
*styrkir hann mær trúar hjartalag,*
*vónin kastar akker í hans favn,*
*leitar har sær trygga hjartahavn;*
*hvar hann er, tú kærleiks himin sært*
*lýsa bjart*

# Bønin hevur alstóran týdning

Set tær fyri at biðja minst tvær ferðir um dagin. Bið frímóðigar og álitisfullar bønir, tí Gud er ein bønhoyrandi Gud.

Alt byrjar í bøn. Bønin má vera grundarlagið undir øllum okkara virksemi – andaligum sum tímiligum. Bønin setir standardin og lyftir okkara virksemi upp.

Á teimum gomlu lokomotivunum høvdu teir ein ketil. Har lempaðu teir kol inní, so at tokið fekk ferð á seg. Somu nyttuna ger bønin. Tað er har, at vit seta ferðina og hitastigini, sum verða skulu á t.d. møtum, stevnum og legum. Bønamøtini eru tað týdningarmesta á slíkum tiltøkum. Bøn broytir meinigheitir, býir og tjóðir.

Jesus er okkar fyrimynd. Hann hevði ein tættan felagsskap við Gud gjøgnum bønina. Tað eru eingi viðurskifti, sum slík lyfti eru knýtt at, sum bøn. ”Men tú, tá ið tú heldur bøn, tá far innar í kamar títt og lat aftur hurð tína og bið til faðir tín, sum er í loyndum, og faðir tín, sum sær í loyndum, skal gjalda tær.” Matt. 6,6. Tú fært signingar hvønn dag.

Øll kunnu biðja. Vit eru sjálvandi á ymsum stigum í bønini; men øll kunnu biðja út frá sínum støði. Vit kenna, at djevulin vil forða okkum at fara í bøn, av tí at bønin er so týdningarmikil.

Tá ið vit lesa um tær ymsu vekingarnar, sum hava verið upp gjøgnum tíðirnar, so síggja vit, at bønin hevur verið miðdepilin og høvuðsinnihaldið. Norðmenn siga: ”En kristen på knærne ser lengre enn en filosof på tærne!

Vón er fyri okkara landi. Tey ikki-kristnu hava ongantíð verið nakar trupulleiki hjá Gudi, men tað hava samkomurnar mangan verið. Tað er samkoman, sum skal vera ljós og salt. Um samkoman er í góðum standi, so brýtur vekingin út í bygd og bý. Svíkur harafturímóti samkoman, so hevur djevulin frítt rásarúm.

Vit hava gleðiboð at bera. Betri tíðindi kann eingin koma við enn evangeliið. Og fólk eru opin í dag.

*Effie Campbell* umsetti.

# Av náði – við trúgv

*Tí at av náði eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guds gáva.*

*Ef. 2,8.*

Mong hava undrast á, at hetta lítla orðið **trúgv** so ofta verður nevnt í Bíbliuni. Tey skilja heldur ikki, at frelsa okkara er so fast bundin at trúnni. Fyri mongum er hetta vorðið eitt mótboð og mótmæli, ein klettur at snáva um; men orðið trúgv stendur fast og er óvikandi grundað á Guds ævigu ráðagerð um okkara frelsu.

Gud hevur frá ævigum tíðum gjørt av og í orði sínum opinberað, at hansara einborni sonur skuldi taka á seg alt frelsuverkið, og at frelsan skuldi verða givin okkum sum gáva. Okkum nýtist tí onki at gera, fyri at vit skulu gerast verd til hesa frelsu.Vit skulu bara taka ímóti henni sum tað, hon er: ein gáva, sum givin verður okkum fyri onki.

Henda gávan verður okkum givin eftir orðum og lyftum. Tí kann hon ikki verða tikin ímóti á annan hátt enn við trúgv. Hin frelsandi trúgvin er at taka ímóti gávuni á ein hátt, sum samsvarar við tann háttin, sum gávan verður givin. Hon verður givin sum gáva, og tí skal hon eisini verða tikin ímóti sum gáva. Gávan verður givin okkum ígjøgnum orð, og tí skal hon eisini verða tikin ímóti við trúgv. Tað einasta, sum vit skulu gera, er at taka ímóti.

*t.* týddi.

# "Í hesi nátt….."

(Luk. 16, 19-31)

Minnist tú hann? Mannin, ið nú ikki visti, hvat hann skuldi gera við alt tað, sum hann ígjøgnum lívið hevði skavað sær saman. – Hann, sum ið hvussu so er veit, at á fátækragarðin sleppur hann ikki, hann er skrivaður inn á stóra, æviga fátækragarðin, har **tey** koma saman, sum ikki brýggja seg um at vera rík í Gudi.

Og so við eitt var alt liðugt. Guds vinir millum fuglar og blómur, sum í langa tíð høvdu heilsað honum hvønn morgun (tó, mundi hann hava varnast tað?) fóru aldri aftur at heilsa honum. Hann hevði livað við tankanum um, hvat morgindagurin fór at geva honum…. Og hevði gloymt, hvat Gud fór at geva honum, og hvat gott hann sjálvur kundi geva næsta sínum – júst í dag.

Og nú gjørdist hin ríki ósigiliga fátækur.

"Í hesi nátt…." Eina aðra ferð hevur Jesus nýtt tey orðini. "Allir munnu tit í hesi nátt fáa meinboga av mær." segði hann langafríggjanátt. Og so fór **hann** inn í náttina. Hann var ríkur – men gjørdist fátækur fyri tína skyld.

Og ein fátækan syndara, sum bað: „Harri, minst til mín, tá ið tú kemur í ríki títt!" tók hann við sær. Himmalsins dyr standa opnar fyri tí, sum er bangin fyri í Guds eygum at vera ov fátækur í tí, sum er reint og gott og stórt.

*Vilt tú sál Guds náði sjá,*
*fest títt eyga á Jesus!*
*Vilt tú frið í hjartað fá,*
*fest títt eyga á Jesus!*

*Vilt tú trygt í deyðan gá,*
*fest títt eyga á Jesus!*
*Vilt tú við Guds trúnu stá,*
*fest títt eyga á Jesus!*

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5. okt. | Tekstur: 1. Mós. 24,1-67; | | bíbliuorð: Matt.7,7 |
| 12. okt. | Tekstur: 1. Mós. 25,24-34 og 27,5-17 og 30-36+42-43; | | bíbliuorð: 2. Mós.20,15 |
| 19. okt. | Tekstur: 1. Mós. 28,10-22; | | bíbliuorð: 5. Mós. 4,39 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74